Ein presisering, sum eg haldi er neyðug at gera:

Sum tað stendur nú:
Stk 2: "Er framleiðslukostnaðurin fyri eina einstaka verkætlan omanfyri 20 milliónir kr., kann umsóknin bara gangast á møti,um játtan fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini"

Uppskot til broytta orðing:
Stk 2: "Er framleiðslukostnaðurin fyri eina einstaka verkætlan omanfyri 20 milliónir kr., kann umsóknin bara játtast afturbering fyri upp til 20 milliónir. Alt omanfyri 20 milliónir kr. kann einans gangast á møti,um játtan fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini"

Orsøkin til hetta er, at sum tað stendur nú kann tað lesast sum at ongin afturbering verður veitt verkætlanum, sum eru yvir 20 milliónir kr. Her verður sjálv støddin á verkætlanini ein forðing. Um automatikkur er í skipanini upp til 20 milliónir, so er tað bert tað, sum er yvir 20 milliónir, sum játtan skal fáast til. Hetta kann fyribyrgja, at størri verkætlanir heldur leita aðrar vegir, tí ongin trygd er fyri afturbering til tann partin av verkætlanini, sum er undir 20 milliónir.

Vinaliga
Jan Berg Jørgensen
Filmshúsið

Fra: Oyvindur av Skarði <oyvindur@uvmr.fo>
Sendt: 14. marts 2023 11:51
Til: film@filmsfolk.fo <film@filmsfolk.fo>; ingunskriv <ingunskriv@gmail.com>; Tina Wagner <tina@filmshus.fo>; Tina Wagner <tina@filmshus.fo>; Jan Berg Jørgensen <jbj@glasir.fo>; Jan Berg Jørgensen <Jan@ffi.fo>
Cc: Joanna Djurhuus <JoannaD@uvmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslur til filmsframleiðslu í Føroyum

Til Filmshúsið og Felagið Føroysk Filmsfólk

Viðheft eru uppskot til **løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum.**

Hoyringarfreistin er fríggjadag 17. mars kl. 12.

Vit harmast um stuttu freistina, men hesa ferð fekk tað ikki verið øðrvísi.

Vinaliga / Kind Regards
Oyvindur av Skarði
Fulltrúi / Advisor

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Ministry of Foreign Affairs, Industry and Trade
Tel. + 298 55 60 82
oyvindur@uvmr.fo • www.uvmr.fo